Bonnerupnevndin vitjar:

Hitti fyrst av øllum oljufyrisitingina

Bonnerup, formaður í Ráðgevandi Nevndini her saman við leiðaranum á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen. Mynd kalmar

Ráðgevandi nevndin hjá danska forsætismálaráðharranum við Bonnerup formanni á odda kom til Føroya í farnu viku.

At spurningurin um eina møguliga framtíðar oljuvinnu eisini hevur stóran áhuga hjá hesi nevnd sæst ikki minst av skránni hjá nevndini. Vanliga plagar Fiskasølan at vera millum fremstu plássini at vitja, men hesaferð stóð Oljufyrisitingin sum nr. eitt á skránni. Um hetta hevur nakað at gera við tann týdning og tær vónir, sum Ráðgevandi Nevndin legg ur í arbeiðið hjá Oljufyrisitingini vita vit ikki, tí tað hevur hvørki eydnast okkum at fáa orð á Bonnrup ella Martin Heinesen.

Men fundurin teirra millum var góður og áhuga verður hava vit frætt.

Í vikuskiftinum hevur nevndin so verið á Tvøroyri og tosað við umboð fyri býráðið. Tað er kanska heldur ikki av tilvild, at Nevndin hesaferð hevur ynskt at tosa um júst umboð fyri Tvøroyrar Kommunu, tí tað er nettup á Tvøroyri, at glottar eru at siggja í øllum tí búskaparliga myrkurinum, har arbeiði er til allar hendur og har ein framleiðslan fyri og onnur eftir sær dagsins ljós.

Í gjár hevði nevndin so fund við Føroya Banka, Sparikassan, Framtaksgrunnin, Havbúnaðarfelagið, fiskivinnudeildina í Tinganesi og Fiskirannsóknarstovuna.

Í dag skal nevndin hitta umboð fyri Føroya Fiskavirking, Faroe Seafood, Gjaldstovuna og síðani fleiri av fakfeløgunum.

Mikudagin kemur túrurin til ALS, Fíggjarnevnd løgtingsins og umboð fyri andstøðuna á tingi.

Seinni verður fundur við almanna- og heilsudeildina í Tinganesi, Starvsmannafelagið og landsstýrið.

Nevndin fer av landinum aftur hósdagin. Frágreiðing frá nevndini kemur í heyst.

jan

viðmerking

Ósemjan í andstøðuni

Fjølmiðlarnir hava í seinastuni gjørt nógv burtur úr, at ósemja valdar í andstøðuni um valið av einum eygleiðara til ta serfrøðingakanning, sum stjórnin hevur sett í gongd av bankamálinum.

Tí skal eg geva hesa frágreiðing.

Kanningin

Fólkaflokkurin legði uppskot fyri tingið í fjør heyst um eina óhefta og serkøna kanning av partabrævabýtinum millum báðar bankarnar og bankasamanleggingina.

Í rættarnevndini mæltu Tjóðveldisflokkurin til, at kanningin skuldi gerast sambært § 21A í rættargangslógini, tvs at tað skuldi vera ein dómarakanning. Øll rættarnevndin tók undir við hesum og gjørdi eisini eitt kommissórium fyri arbeiðinum.

Løgtingið samtykti einmælt uppskotið, sum ein samd rættarnevnd setti fram.

So kom alt stríðið, sum almenningurin veit um. Tað endaði við, at 17 samgongutingmenn gingu frá teirri einmæltu løgtingssamtyktini og góðtóku, at stjórnin í staðin setti eina serfrøðingakanning í verk.

Meirilutin samtykti eitt uppskot til samtyktar, har heitt varð á stjórnina at gera ymsar broytingar í tí uppskoti, hon hevði lagt fyri Fólkatingið, og sum hevði fingið tvær viðgerðir. Ein av broytingunum skuldi vera, at tilsamans seks eygleiðarar skuldu fylgja kanningini, tríggir danskir og tríggir føroyskir.

Eygleiðararnir

Løgmálaráðharrin legði broytingaruppskot fyri Fólkatingið. Í § 1 kom sum nýtt stk. 4:

»Justitsministeren og Færøernes landsstyre udpeger hver 3 personer, der følger undersøgelsens gennemførelse«.

Sum tað sæst er tað Landsstýrið, sum skal tilnevna teir tríggjar føroysku limirnar. Í sjálvari lógini stendur onki um, hvørjir teir skulu vera, men í viðmerkingunum stendur, at gingið verður út frá, at stjórnin fór at tilnevna ríkisgrannskoðaran og Landsstýrið landsgrannskoðaran. Um hinar fýra eygleiðararnar stendur:

»De pågældende personer vil f.eks. kunne være sagkyndige. De personer, der udpeges af landsstyret, vil kunne være medlemmer af Lagtinget«.

Her verður fyrst nevnt, at teir fýra eygleiðararnir kunnu vera sakkønir, men skoytt verður tó uppí, at teir tveir eygleiðararnir, sum Landsstýrið tilnevnir aftrat landsgrannskoðaranum, kunnu vera løgtingsmenn.

Samgonga/andstøða

Ongastaðni, hvørki í lógini ella í viðmerkingunum, stendur nakað um, at samgonga og andstøða á Løgtingi skulu tilnevna hvør sín eygleiðara.

Í Løgtinginum er ein samgonga millum fýra flokkar: Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin, Verkamannafylkingina og Sjálvstýrisflokkin. Henda samgonga hevur skipað landsstýri.

Í Løgtinginum eru eisini fýra andstøðuflokkar: Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin, Miðflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin. Hesir flokkar eru ikki í samgongu, men virka hvør sær. Ongin av hesum fýra flokkunum góðtók ta kanning, sum stjórnin nú hevur sett í verk.

Andstøðan hevur, sum víst er á, als onga skyldu at tilnevna nakran eygleiðara, og harafturat er tað skeivt at rokna andstøðuna sum eina eind eins og samgonguna.

Tjóðveldisflokkurin heldur tó, at um eygleiðarar skulu tilnevnast til hesa kanning, sum flokkurin ikki góðtekur, eiga teir at vera sakkønir, t.d. løgfrøðingar, ikki politikarar. Tað samsvarar eisini betur við viðmerkingarnar til lógina um serfrøðingakanning, har sakkønir verða nevndir fyrst.

Tað er jú eisini soleiðis, at sjálvt um tveir løgtingsmenn verða tilnevndir at fylgja kanningini, umboða teir ikki alt Løgtingið, heldur ikki um annar er samgongu- og hin andstøðutingmaður. Teir koma í eina serstøðu í mun til hinar 30 løgtingsmenninar.

Endamálið við eygleiðarum er ikki, at tann vitan, sum hesir fáa, skal kunna avlaga politiskan tvídrátt, sum møguliga tekur seg upp, tá kanningin er liðug.

Finnbogi Ísakson

Lýsingartorgið

Allar lýsingar til Lýsingartorgið SKULU VERA SKRIVLIGAR! Vit taka ikki móti lýsingum til Lýsingartorgið í telefonini, men vilja hava tær annaðhvørt í brævi ella telefaksi. Lýsingartorgið er í blaðnum hvønn týsdag, hósdag og leygardag

SOSIALURIN, Postboks 76, FR-110 Tórshavn
Telefaksnummarið er: 14720